# Páll Sigmund og Debes vunnu

*Stóra kappingin, Føroya Bjór Simultan, varð leikt kring landið seinasta leygardag. Úrslitið gjørdist ein greiður sigur til Páll Sigmund Sørensen og Debes Christiansen*

ARNBJØRN SIVERTSEN

Leygardagin 22. januar var tann árliga Føroya Bjór simultan kappingin spæld um landið. Spælt var í Klaksvík, Fuglafirði, Miðvági, Tórhavn og á Tvøroyri. Hetta er eitt spælistað meir enn í fjør, tá luttøkan setti met við heili 60 pørum. Men hóast hetta var luttøkan nakað minni í ár, tá 46 pør settust við bridgeborðini kring landið.

Orðið simultan merkir, at nakað verður gjørt samstundis. Tað vil í hesum førinum siga, at bridgespælarar kring landið sita og spæla tey somu kortini samstundis. Hetta kann lata seg gera við, at kortini verða blandað frammanundan, kopieraði og send út til tey ymsu spælistøðini. Tá kappingarnar á teimum lokalu spælistøðunum er lidnar, verða úrslitini savnað saman á einum stað, og vit fáa eitt úrslit fyri alt landið.

Páll Sigmund Sørensen og Debes Christiansen úr Klaksvík vunnu greiðan sigur í tí samlaða úrslitinum.

**Tey lokalu úrslitini:**
Á teimum fimm spælistøðunum kring landið, vóru trý tey fremstu pørini hesi:

**Tórshavn (6 borð, miðal 180)**
1 Bogi Simonsen - Arne Mikkelsen, 219
2 Hans Jacob Petersen - Arnbjørn Sivertsen, 215
3 Jens Pauli G. Nolsøe - Kaj Alstrup, 209

**Miðvágur (4 borð, miðal 84)**
1 Julian Olsen - Kristian Guttesen, 101
2 Ruborg Zachariassen - Gunnvør Hansen, 96
3 Jóhan Hendrik Guttesen - Árni Jacobsen, 94

**Fuglafjørður (4 borð, miðal 96)**
1 Árant Berjastein - Magni Jøkladal, 127
2 Marner Joensen - Árni Dam, 103
3 Edmund Joensen - Dia Jacobsen, 103

**Tvøroyri (4 borð, miðal 84)**
1 Einar Larsen - Niels Pauli við Reiðlíð, 108
2 Oddur Dimon - Helgi Strøm, 98
3 Johan í Smiðjuni - Óla Jákup Olsen, 96

**Klaksvík (4 borð, miðal 84)**
1 Páll Sigmund Sørensen - Debes Christiansen,114
2 Mogens Højsted - Karl Isaksen, 100
3 Jórun Højsted - Marita Krosstein, 93

**Úrslitið fyri landið**
Eftir kappingina varð talt saman fyri alt landið, og var urslitið av hesum sum niðanfyristandandi:

1 Páll Sigmund Sørensen - Debes Christiansen, 794
2 Bogi Simonsen - Arne Mikkelsen, 703
3 Mogens Højsted - Karl Isaksen, 688
4 André Dalfoss - Gullokk Svalbard, 677
Josta Olsen - Verna Rasmussen, 677
6 Tummas Hans Gaardlykke - Jákup Egholm, 666
7 Jens Pauli G. Nolsøe - Kaj Alstrup, 662
8 Hallur Ellingsgaard - Petur Sigurð Rasmussen, 653
9 Julian Olsen - Kristian Guttesen, 652
10 Hans Jacob Petersen - Arnbjørn Sivertsen, 648
11 Áki Dimon - Knútur Nygaard, 645
12 Ruborg Zachariassen - Gunnvør Hansen, 638
Oddur Dimon - Helgi Strøm, 638
14 Marjun Restorff - Arnleyg Mikkelsen, 632
Carl Mikkelsen - Jógvan Ranghamar, 632
16 Jórun Højsted - Marita Krosstein, 629
17 Johan í Smiðjuni - Óla Jákup Olsen, 628
Einar Larsen - Niels P. við Reiðlið, 628
19 Allan Dal-Christiansen - Jóannes Mouritsen, 626
20 Eirikur Joensen - Robert Langgaard, 623
21 Edmund Joensen - Dia Jacobsen, 621
22 Árant Berjastein - Magni Jøkladal, 619
23 Sigmund Dam - Eyðun Anthoniussen, 577
24 Jógvan Clementsen - Jutta Heinesen, 573
25 Páll Hansen - Dia Petersen, 564
26 Henning Eysturoy - Jenis Tummasarson, 560
27 Elsa Heinesen - Johan Nielsen, 548
28 Ingibjørg Hansen -Hans Egil Joensen, 542
29 Heðin Mouritsen - Jákup Hjaltalin, 541
30 Súsanna Martinsdóttir - Súsanna Dam, 540
31 Marner Joensen - Árni Dam, 527
32 Johan Hendrik Guttesen - Árni Jacobsen, 525
33 Christian Joensen - Edvin Toftegaard, 522
34 Oddur Fjallsbak - Hans E. Fjallsbak, 520
35 Ingier Petersen - Tórður Holm, 508
36 Andras Róin - Danny Danielsen, 506
37 Steingrím Weihe - Hanus Bærentsen, 487
38 Steinbjørn Jacobsen - Karin M. Jacobsen, 469
39 Hjalmar Joensen - Henning Anthoniussen, 463
40 Ingibjørg Holm - John Reid Skoralíð, 456
41 Andreas Djurhuus - Edvard Magnussen, 442
42 Jóannes Heinesen - Villi Kruse, 433
43 Hans Arni Ellefsen- Andreas Berglíð, 397
44 Páll Tummasarson - Ási Jacobsen, 370
45 Petur Klein - Jákup Klein, 341
46 Eyðun Olsen - Jóannes Sólheim, 302

**Spæl frá liðkappingini í Nýggja Bridgefelag**
Onkusvegna tykist mær léttari at skriva um tey miseydnaðu spølini hjá mær sjálvum. Hetta skildast partvíst eitt ávíst smædni, men eisini tað, at tey miseydnaðu spølini ofta eru minst líka áhugaverd sum tey góðu. Nú eitt kvøldið í Nýggja Bridgefelag, har eg var substituttur fyri Boga Simonsen, eydnaðist mær at spæla eitt spæl væl, sum eg eisini havi hug at skriva um.

V/-

| | | |
|---|---|---|
| | **Norður**<br>sp AQ85<br>hj 87<br>rú KJ104<br>kl J102 | |
| **Vestur**<br>sp 1093<br>hj 105<br>rú 9865<br>kl AKQ5 | | **Eystur**<br>sp KJ72<br>hj Q9643<br>rú Q<br>kl 876 |
| | **Suður**<br>sp 64<br>hj AKJ2<br>rú A732<br>kl 943 | |

| **V** | **N** | **E** | **S** |
|---|---|---|---|
| Øssur Dam Jacobsen | Arne Mikkelsen | Torkil Skála | Arnbjørn Sivertsen |
| pass | 1rú | 1hj | 3ut |
| pass | pass | pass | |

Útspæl: klA

Øssur tók 4 kleyvarastikk og skifti til spaðara. Tá Torkil hevði meldað inn 1hj, og Øssur longu hevði víst AKQ í kleyvara, var eingin ivi í, at Torkil hevði spK. Eg tók tí við essinum og spældi hjartara til dreingin, rútara til kongin (frúgvin fall). Tá síðan rútarin varð tikin, varð støðan hendan, áðrenn tann síðsti varð tikin:

| | | |
|---|---|---|
| | Q8<br>8<br>J<br>- | |
| 93<br>10<br>9<br>- | | K<br>Q96<br>-<br>- |
| | -<br>AK2<br>7<br>- | |

Eystan er kroystur, tá rúJ verður spældur frá borðinum. Hann kann ikki kasta spK, so fær spælførarin 9. stikkið fyri spQ. Hann mátti tí kasta ein hjartara, og Sunnan fekk trý tey síðstu stikkini í hjartara.

Hetta er ein spæliháttur, ið nevndur verður at skvisa. Eitt alternativ til tað nógv nýttu og misnýttu klípingina, sum ofta ikki verður sæddur, men ofta riggar. Royn sjálvur, tá tú ert vísur í, at ein klíping miseydnast!

Lat tað vera nevnt, at Arnleyg Mikkelsen eisini spældi hetta spælið á sama hátt og vann sínum liði nøkur imp.

Eydnaðist okkum at vinna nøkur IMP fyri spælið? Nei - í hinum rúminum høvdu liðfelagarnir, sum skulu sleppa at vera ónevndir, „offrað“ og avleverað 500, so vit taptu 3 imp fyri spælið.

**FM kvinnupør**
Tann næsta kappingin hjá FBS, FM fyri kvinnur, verður leygardagin 5. februar kl 14.00 í Bridgehúsinum í Havn. Spæld verða umleið 40 spøl. Tekning hjá Boga Simonsen, telefon 31 20 33, ella Marjun Restorff, telefon 31 91 42, í seinasta lagi 3. februar.

# Allir útisetarnir taptu

*Flogbóltur: Tað gekk ikki væl í hond hjá føroysku flogbóltsútisetunum um vikuskiftið. Øll trý »føroysku« liðini taptu sínar dystir*

SVEINUR TRÓNDARSON

Sjálvt um Gudrid og hinar Fortuna genturnar høvdu vunnið oddadystin móti DHG vikuskiftið frammanundan, so var tað ikki nóg mikið spartk í afturpartin til at tær skuldu vinna dystin móti HIK Ålborg, sum tær vitjaðu í vikuskiftinum.

Fortuna var eitt sindur við í byrjanini av dystinum, men av tí at tær fóru at gera nógvar persónligar feilir var lítið at gera hjá teimum. HIK vann dystin greitt 2-0.

Ósigurin hjá Fortuna kann fara at vísa seg at vera ótrúliga óheppin. Fýra lið koma víðari í endaspælið og tey fimm fremstu liðini liggja næstan púra jøvn. Bara fýra stig eru millum tey, og Fortuna og HIK liggja púra jøvn við 14 stigum á fjórða og fimta plássi.

Hetta merkir í veruleikanum, at Gudrid og Fortuna skulu vinna dystirnar sum eftir eru fyri at tryggja sær pláss í endaspælinum, og so kann tað vera fullkomiliga líkamikið hvørjum tær spæla ímóti.

**Bara æran eftir**
Hjá Bárði og mansliðnum hjá Fortuna er so at siga bara æran eftir at spæla fyri.

Tað hevur gingist illa í hond hjá Fortuna, tí liðið hevur bara fingið seks stig til høldar alt kappingaraári.

Kortini hava teir leikt væl í fleiri dystum, men teir hava bara ikki havt tað neyðuga hepni til at vinna dystirnar.

Um vikuskiftið vóru teir í Ålborg, og enn einaferð taptu teir 2-0. Kortini var dysturin ikki so ójavnur, sum úrslitið sigur, tí báðir hálvleikirnir endaðu við javnbrótarum, og í báðum førum vann HIK javnbrótaran 7-5.

Bárður hevur ikki vant tað stóra í seinastuni, orsakað av próvtøku, og hevði ikki ætlað sær at fara við til Ålborg, men hin hevarin á liðnum lá við beinkrími dagarnar undan dystinum og hevði tí forfall. Men líka lítið hjálpti og Fortuna liggur enn næstaftast í kappingini.

**Nú stendur á gomlum naglum**
Í TV55 stendur púrt einki til. Har spæla Alvilda Ólavsdóttir og Annika Joensen, men tað er synd at siga at tær hava havt eydnuna við sær í ár.

Liðið liggur aftast í deildini við bara tveimum stigum, og tað sær tí meiri enn svart út hjá teimum.

Um vikuskiftið taptu tær 2-1 á heimavølli móti ASV Århus, sum annars lá beint frammanfyri tær í stigatalvuni. Hetta hevur neyvan gjørt lagi betri, og tað bøtti ikki um møguleikarnar hjá »føroyska« liðnum at yvirliva í meistaradeildini til næsta kappingarár.

Kortini er enn ein møguleiki, tí Skt. Jørgens liggur á næstaftasta plássi og hevur bert tvey stig fleiri enn TV55, so hóast tað sær svart út, er ov tíðliga at geva upp alla vón.



# Lýsingartorgið

**Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:**
✓ privatar lýsingar
✓ í mesta lagi 40 orð
✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**Vanl. lýsingaprísur:**
✓ frá fyritøkum og virkjum
✓ fleiri enn 40 orð
✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

**tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
**Lýsingar, gjaldast skal fyri:**
**50,- kr. + MVG hvørja ferð:**
✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ Bill. merktar

## Akfør

**4 ORGINALAR BMW FELGUR**
við næstan nýggjum píkadekkum til sølu fyri 1.000 kr. pr. stk. Passa til BMW 500 seriuna. Um hetta hevur áhuga so ring.
Tlf. 457785

**AUDI 100**
árg. 87, diesel, til sølu. Boð undir 8.000 kr. ongan áhuga.
Tlf. 455271/217271

**HONDA CIVIC 15 i VE**
Árg. 98 kort 30.000 við sportfelgum og heilársdekk og eykafjaðrar, gott stereoanlegg, til sølu.
Tlf. 447881

**CITROÉN 2.0 I**
árg. 4/96 48.800 km. Aut. gear, sentrallás, radio, cd-spælara + kassettu sum alt kann stýrast frá rættinum eisini. El-rútar og spegl. Er sum nýggjur 140.000 kr. við kontrakt, ella í býti við ein vanligan góðan diesel bil í nakað sama prísklassa og ikki eldri.
Tlf. 319020

**4 PÍKADEKK Á FELGUM**
til sølu 155/70 R13. Heilt lítið brúkt og passa til smáar Ford-bilar.
Tlf. 373054

**DAIHATSU CHARADE**
frá ´84, til sølu fyri 2.000 kr. ella hægsta boð.
Tlf. 316640

**DIESEL MOTORUR**
til sølu fyri 2.000 kr. passar til Kadet og Ascona.
Tlf. 423080

**EIN TOYOTA**
Dyna 300, bíliga til sølu.
Tlf. 332580

**EIN TOYOTA CARINA E**
2.0 Gli árg. 4/96 til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin hevur nýggj heilársdekk á felgum, og einar óbrúktar sportfelgur við nýggjum dekkum fylgja við. Koyrt umleið 105.000 km. Bilurin er í sera góðum standi.
Tlf. 281611

**EYKALUTIR**
Ymiskir eykalutir til Nissan Bluebird, model U11 árg. 1985 til sølu.
Tlf. 281902
ella 282386

**EYKALUTIR TIL VOLVO 240 G**
Hurð v/f, baklúka, forskermar, forlyktir, kompl. + baklyktir, bakrútar, kúfangara f. kompl. setur, pyntilistar, kølari, v.m., bíliga til sølu.
Tlf. 313867/219070

**EIN TOYOTA COROLLA GTI**
Twin-Cam frá 88, til sølu.
Tlf. 283638 ella 447451

**FORD ESCORT**
Svartur Ford Escort 1.8 sport, 4 ár, koyrt 77.500 km, hevur spoilarar, sportfelgur, breið dekk, v.m.
Tlf. 315143 ella 287005

**FORD ESCORT 1,4 CL**
árg. 87. Koyrt 104.000 km. til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 456053 e. kl. 16

**FORD ESCORT 1,8 SPORT**
við sportfelgum. Árg. 95, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 315143 kl. 8-16.30

**FORD ESCORT SAVOY**
árg. 89, svartur, 5 gear, sær gott út, við píkadekkum, til sølu fyri 12.000 kr.
Tlf. 317865 & 282165

**FORD SIÉRRA 1,6**
stationcar, árg. 87, til sølu fyri 6.000 kr. Koyrir væl og er sýnaður í juni 1999.
Tlf. 310529

**FORD SIÉRRA ÁRG. 87**
Uttan nummarplátur, skift lyktir, tanga, el-rútar, 1 ára gomul dekk, bíliga til sølu.
Tlf. 315864

**HONDA ACCORD 1,8 EX**
árg. 85 alu-felgur + eykafelgur við vetrardekkum. Koyrt 120.000 km, powerstýring, el-rútar, sentrallás, til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 318503

**HONDA CIVIC 1,5 GL**
árg. 87. Sær hampuligt út og koyrir gott.
Tlf. 315734

**JEEPUR TIL SØLU**
Ein Nissan Patrol Turbo Diesel jeepur, bláur, árg. 88, til sølu. Er í góðum standi.
Tlf. 422456

**MAZDA 323 1,6 GTI**
vínreyður árg. 89 til sølu. Hevur sportfelgur, nýggj dekk, nýtt útstoyt, nýggjar stoytdoyvarar, 2 hurðar, JVC anlegg og JBL hátalarar fylgja við. Koyrt 100.000 km. Bilurin hevur teknisk brek.
Tlf. 447466 & 217640
eftir kl. 18

**MAZDA 626**
2,0 16V, GLX, hvítur, árg. 92. Hevur krók. Til sølu um nóg høgt boð fæst.
Tlf. 444696
ella 288696

**NISSAN KING-CAB**
Árg.´85, bíliga til sølu. Best egnaður sum eykalutir.
Tlf. 282691
ella 317691

**NISSAN PATROL**
3.3 Turbo D, koyrt 174.000 km, setur aftan (innreg. sum persónbilur) árg. 12/85.
Tlf. 220828

**FORD ESCORT**
Ein ford Escort frá 1997 er til sølu.
Tlf. 375477 ella 375195

**NISSAN PRIMERA SLX 2.0**
árg. 7/98, myrkt reyður. Koyrt 22.000 km. hevur air-condition, pioneer fløguspælara. 4 píkadekk fylgja við, prísuppskot 140.000 kr.
Tlf. 361090

**NISSAN SUNNY TIL SØLU**
Nissan Sunny '86 til sølu fyri 7500,- Sýnaður jan. 2000. Spildunýggj heilársdekk, nýggjan akkumulator, nýggj bremsurør. Bilurin er í góðum standi og hevur bert koyrt 128.000 km.
Ring 217212
millum 12 & 13, og aftaná kl. 17

**OPEL MANTA 2.0**
Árg. 84, til sølu.
Tlf. 441861 & tlf. 452105
e. kl. 19 Nikłái

**OPEL RECORD**
2,2i, aut. gear, árg. 88, nýggj vulk. píkadekk á felgum, 4.000 kr.
Tlf. 319841 - 17

**ORDANS DOLLARGRIN**
Saab GLi, av góða 83-árganginum. Rustaður gamaní, men koyrir sum ein røvari og hevur stórt, gott bagagurúm. Við eini bøtandi hond fært tú ein bíligan bil við formati - ella nógvar góðar eykalutir.
Tlf. 319141 aftaná kl. 17.

**PEUGEOT 306 STYLE**
Gráur, árg. feb. 97, til sølu. Vælhildin, koyrt 26.000 km, við píkadekkum.
Tlf. 319101

**PEUGEOT 306 XSI**
St. car 10 mánaðar gamal, 2.0i 135 hk el-vindeygu, alu-felgur, centrallás dupult airbag, fløguspælara o.a. 130.000 kr.
Tlf. 318700 & 243224

**PEUGEOT 309**
Svartur, árg. 87, koyrt 109.000 km, til sølu.
Tlf. 332807, best eftir kl. 18

**PEUGEOT 406**
Um hóskandi boð fæst selji eg ein Peugeot 406 2.0 SV árg. juli 96. Km. 47.000.
Tlf. 282896 & 456473

**SPORTFELGUR**
Seger 15"x7", dekkini 203/SO. Passa til Sierra og Escort.
Tlf. 441193 ella 442191

**TIL SØLU**
Nissan Patrol 3,3 Turbo Diesel árg. 88, sýnaður nov. 99, best eftir kl. 17.
Tlf. 422522

**TIL SØLU**
2 Ford Granada ein hevur plátur og koyrir, hin kann nýtast sum reservadeilir, fyri 5.000 kr.
Tlf. 449339
eftir kl. 17

**TIL SØLU**
Eitt 17" dekk til knallert og ein skermur, til sølu fyri 200 kr.
Tlf. 448023

**TIL SØLU**
Ein Opel Rekord 2.2i árg. 85, hevur koyrt 120.000 km. Bilurin er koksgráur, og sær sera gott út. Bilurin er í sera góðum standi.
Ring 456562

**TIL SØLU**
Ein Opel Rekord 2.2i árg. 85, hevur koyrt 120.000 km. Bilurin er koksgráur, og sær sera gott út. Bilurin er í sera góðum standi.
ring 456562

**TIL SØLU**
Volvo 240 til sølu fyri 7.500 kr.
Tlf. 424047

**TIL SØLU**
Ein Volvo 244. Krevur ábøtur hevur plátur, kann koyra, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 449339 eftir kl. 17

**TOYOTA CARINA 1,6**
árg. 15//-89. Km 180.000, bíliga til sølu.
Tlf. 313406

**TOYOTA HILUX**
til sølu. 4x4 diesel, árg. 2/12/87 200.000 km. møguliga í býti við Diesel persónbil.
Tlf. 374373 eftir kl. 18

**TURBO DIESEL**
M. Galant td. 1800, í góðum standi til sølu fyri 60.000 kr. íroknað sportfelgur & anlegg.
Tlf. 214381

**TURBO TRANS-AM**
Reyður Turbo Trans-Am, árg. ´81, í sera góðum standi til sølu um hóskandi boð fæst. Sí annars lýsing í blaðnum leygardagin!
Jón Sigurdsson, Ísland
Tlf. + 354 8613080
Tlf. + 354 4212339

**VAUXHALL CAVALIER 2000**
frá 1980 til sølu sum eykalutir.
Tlf. 319986 e. kl. 15

**VETRARDEKK**
spildurnýggj av slagnum »Nordfrost« til sølu bíliga, vegna feilkeyp, stødd 175/14
Tlf. 372637

**VETRARDEKK**
Nýggj lamell píkadekk, flest allar støddir, til sølu.
Tlf. 282691
ella 317691

**VETRARDEKK TIL SØLU**
Nýggj lamel/píkadekk, flest allar støddir, til sølu.
Tlf. 282691
ella 317691

**VOLVO 740 GLE**
aut. gear. árg. 88, sýnaður sept. 99 til sølu fyri 18.000 kr.
Tlf. 319997, 219997
ella 211012 eftir kl. 17.30

**VOLVO 760 GLE 2,3**
Turbo Intercooler til sølu. Bilurin, sum er frá 89, hevur at kalla alt s.s. leðurinntrekk, el-stólar, el-sóltak, klimaanlæg v/air-conditión, tjóðaríalarm, sentrallás v/fjarstýring, sportfelgur og mangt annað. Harafturat er hann galvaniseraður, og er heilt uttan rust. Áhugaði kunnu ringja á
tlf. 214478

**VW PASSAT**
til sølu sum eykalutir, árg. 88. fyri 3.000 kr.
Tlf. 370362

**YNSKIST**
Ein síðurútur framman høgrumegin til ein Opel Kadett frá 89, 5 hurðar og kúfangari aftan til ein Daihatsu Rocky frá 85.
Ring 283706 ella 320368, spyr eftir Finn. Best eftir kl. 15.

**YNSKIST TIL KEYPS**
Minibuss til 8 ferðandi.
Tlf. 372110 & 215210

## Amboð

**TIL SØLU**
Nýggj karossarí lift, til sølu fyri 19.000 kr.
Tlf. 218778

## Arbeiði

**ALT FYRIFALLANDI ARBEIÐI**
verður gjørt av tilkomnum manni, ið er hondverkari.
Tlf. 310352

**ARBEIÐI YNSKIST**
13 ára gamal drongur søkir arbeiði, alt hevur áhuga.
Tlf. 316587

**NORSK JENTE**
20 år, søker arbeid. Alt av interesse.
Tlf. 321393

**RØRARBEIÐI**
Alt innan rørarbeiði verður gjørt, so sum skiftan av ketlum og kranum.
Tlf. 457621 & 221031

**VIT SØKJA EFTIR**
raskari gentu/konu at gera reint uml. 2 tímar um vikuna.
Ringið 220425 e.kl. 18

## Barnaútgerð

**BABYSITTER (LURTITÓL)**
til sølu. Ein Philips babysittari frá aug. 99 til sølu. Nýprísur 700 kr. nú 450 kr.
Tlf. 451295

**BARNASTÓLUR**
Myrkabláur/lilla við kalesju, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 317648

**BARNAÚTGERÐ**
Brúkt barnaútgerð í góðum standi ynskist til keyps. Bilbarnastólur frá 5 mðr, høgur barnastólur (Brio) og gyring til trappur.
Tlf. 311 508

**BERBARUR BILSTÓLUR**
Merki Britax (Rock-a-Tot) stødd 0-15 mán. Sera vælhildin. Til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 319510 eftir kl. 17

**BILSTÓLUR**
Ein óbrúktur bilstólur við honk og kalesju til sølu fyri 650,- kr.
Ringið 289804

**BILSTÓLUR TIL SØLU**
1 1/2 ára gamal vælhildin Chicco bilstólur 0-13 kg, til sølu fyri 450 kr.
Tlf. 320436

**WEEKEND-SONG**
til børn ynskist til keyps.
Tlf. 314112

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út- & sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ……………… |

**Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi**

Sent hevur:

Navn: ……………………………………………

Bústaður: ……………………………………………

Bygd/býur: ……………………………………………

Tlf.: ……………

»Lýsingartorgið«
*Tíðindablaðið*
**Sosialurin**
Box 76,
110 Tórshavn

**Til frímerki**